

Aksel Johannesen, løgmaður saman við børnum frá Uummannaq í Grønlandi á Arctic Circle ráðstevnuni. Myndir Jan Müller

# Løgmaður hitti børnini frá Uummannaq í Hørpuni

**Jan Müller**

22.10.2015 - 16:13

Oljan.fo

Arctic Circle. Tá tú er Føroya løgmaður og entá spildurnýggjur og luttekur á altjóða ráðstevnum, hevur tú sum vera man nógv jørn í eldinum. At umboða eina ta minstu tjóðina í Arktis og skula heilsa uppá høg sum lág. Hetta upplivdi nýggi løgmaðurin, Aksel Johannesen, tá hann luttók á Arctic Circle ráðstevnuni í Reykjavík farnu dagarnar, har tað mundi tátta í 2000 áhoyrarar og vitjandi. Teirra millum vóru statsleiðarar og framstandandi fakfólk og serfrøðingar á nógvum økjum, men eisini umboð fyri upprunafólk í Arktis, og her eisini við einum føroyskum broddi.

Millum upprunafólkið vóru eisini fleiri umboð úr Grønlandi, eitt nú børn úr Uummannaq, saman við leiðara ella mammu teirra, føroysku Ann Andreassen, sum er vorðin kend um allan heim fyri stóra og slóðbrótandi arbeiði sítt at standa á odda fyri barnaheimi í grønlendsku bygdini Uummannaq. Tey sungu og settu sín serstaka dáma á tiltakið í tí stóru felagshøllini í Hørpuni. Hetta var eisini eitt gott høvi hjá teimum at hitta nýggja løgmann, sum ikki kundi bara sær fyri at rósa teimum og takka Ann Andreassen fyri hennara stóra arbeiði til frama fyri grønlendsk børn.Tann sosiali og mentanarligi parturin hevur eisini stóran týdning fyri Arctic Circle tiltakið, sum umframt at leggja upp til konstruktivan dialog eisini varpar ljós á tey menniskju, sum búleikast í hjartanum á Arktis og teirra siðir og mentan.

Í hesum sambandi hevði løgmaður eisini høvi til at hitta grønlendska uttanríkisráðharran, Vittus Qujaukitsoq, sum varð við til Arctic Circle.



Aksel Johannesen, løgmaður saman við grønlendska uttanríkisráðharranum og Sjúrða Skaale, fólkatingsmanni.





Petur Petersen, føroysku sendiharri í Íslandi og Ann Andreassen, leiðari á barnaheiminum í Uummannaq.



